## HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara tann 19. juli so minnisríkan og góðan.
**Esther og Jantórur**



Hjartaliga takka vit øllum, sum við vitjan tykkara gjørdu okkara silvurbrúðleypsdag 2. aug. 2003 ógloymandi. Takk fyri gávur, blómur, fjarrit og alla hjálp.
**Heilsan Elisabeth og Jógvan Joensen**



**Góða Bertha**
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum 21. sept.
**Heilsan mamma, babba og beiggi**



**Hey Elias**
Hjartaliga til lukku við 1 ára degnum í dag. Eisini ein heilsan til Margit.
**Ynskir omma og abbi í Klaksvík**



**Góða Ásbjørg**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 19. sept.
**Ynski eg tær Hansa mostir**



**Til Tonju Elin í Århus**
Góða Tonja Elin. Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum tann 23. sept. Eisini ein heilsa til Lailu.
**Ynskja omma og abbi í Leirvík**



**Góða elskaða Laurina**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum tann 21. sept. Eisini ein heilsa til Bjartu.
**Ynskja mamma og pabba**



**Góða langomma**
Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum 21. sept. Tú er tann besta omman ein kann ynskja sær. Takk fyri nógvar góðar leygardagar.
**Ynskja vit Ísak & co**



**Góða langomma**
Stóra tøkk fyri eina góða feriu. síggjast skjótt aftur. Nógv klemm frá
**Lív Hjørdis**



**Góða systi**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 19. sept.
**Ynskir Hans Pauli**



**Halló tit báðir**
Ogor vilja hervið takka fyri túrin í Havn í summar. Ogor gleða ogun til næsta kappingarár.
**Ynskja ogor 7 á Firvaldi**

**Til Herit og John í Keypmannahavn**
Góðu tit bæði. Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, John tann 9. sept. og Herit tann 22. sept. Eisini ein heilsan til Elin Simonu.
**Ynskja foreldur, verforeldur, omma og abbi í Leirvík**




## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mikudegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




# Fox aftur á pallin í Vestmanna




Vælumtókti Vestmannabólkurin frá sjeytiárunum, Fox, fer aftur á pallin í Vestmanna Ítróttarhøll leygarkvøldið 27. september saman við tveimum øðrum kendum bólkum úr Vestmanna, Thunderbirds og Western. Talan er um afturvendandi reunion-tiltakið hjá VÍF, har gamlir Vestmannabólkar spæla til dans

Leygarkvøldið skipar VÍF aftur fyri einum av sínum reunion-tiltøkum, tá gamlir Vestmannabólkar fara at spæla til dans í Vestmanna Ítróttarhøll.

Hesuferð hevur tað eydnast at savna limirnar í einum av Føroya kendastu tónleikabólkum frá sjeytiárunum, Fox. Bólkurin var síðst á palli 2. páskakvøld í 1986, tá Ungmannafelagið GEILIN skipaði fyri konsert í Vestmanna, sum var fyrsta stóra tiltakið í ítróttarhøllini, ið varð tikin í nýtslu stutt frammanundan. Á hesi konsertini spældu m.a. Fox og Hjarnar, og nú 17 ár seinni hava limirnir í Fox aftur tikið ljóðførini fram.

Teir, sum manna Fox, eru brøðurnir Tróndur og Gunnar Streymoy, Bogi Olsen, Martin Joensen og Pauli Magnussen. Fox var mest frammi mitt í sjeytiárunum, og í 1976 vóru teir við á fyrstu reunion-konsertini hjá VÍF saman við t.d. Thunderbirds, sum eisini vera við leygarkvøldið. Thunderbirds spældu í seinnu helvt av sekstiárunum, og teir hava javnan verið á palli seinnu árini bæði í Vestmanna og eitt nú í tiltakinum "Aftur í 60'ini" í Havn. Teir, ið manna Thunderbirds, eru Øssur Christiansen , Joen Magnus Olsen, Jógvan Páll Johannesen, Gulak Zachariasen, og Tróndur Streymoy er eisini við í hesum bólkinum.

Ein av elstu tónleikabólkunum í Vestmanna, Western, verður eisini at hoyra leygarkvøldið. Western var við til at mynda føroyskt tónleikalív øll sekstiárini, og teir hava eins og Thunderbirds eisini javnan verið á palli síðani. Limirnir í Western eru m.a. Guttormur Christiansen, Tórur Streymoy og Marner Olsen.

- Reunion-tiltøkini eru vorðin afturvendandi táttur í Vestmanna. Tey eru sera væl umtókt, tí bæði vestmenningar og onnur fáa høvi at leita aftur til tíðina íieksti- og sjeytiárunum, tá ung í Føroyum í hópatali fóru til Vestmanna at dansa í vikuskiftunum, sigur Páll Hellu, sum vegna VÌF skipar fyri reunion-tiltøkunum.

Nógvir tónleikabólkar hava millum ár og dag sæð dagsins ljós í Vestmanna, og flestu teirra eru við jøvnum millumbilum at hoyra aftur á reunion-tiltøkunum, alt meðan nýggir bólkar eisini leggjast afturat.

Náttarbussurin, sum vanliga koyrir millum Vestmanna og Havnina í vikuskiftunum, koyrir eisini leygarkvøldið, og fyrireikararnir rokna við, at aftur í ár fer nógv fólk til tónleikaliga sameining í Vestmanna at dansa og minnast aftur á gamlar dagar.

Peningurin, sum kemur inn, fer óskerdur til VÍF.

Fleiri upplýsingar fáast hjá Páll Hellu á telefon 42 41 54 ella 25 20 54. Eisini ber til at ringja til Kára Durhuus á telefon 21 59 77.

## VIÐMERKINGAR

# Vegurin Skálabotnur - Strendur

**Tummas Eli H. Joensen**

Nú verður fíggjarlógin smíða fyri komandi ár, av okkara kosnu monnum.

Vit her á vestara armi á Skála - fjørðinum, eru sera spent eftir at frætta tey tíðindi, at nú eru so og so nógvar milliónir settar av til okkara veg. Kanska okkara kosnu menn hava sæð tann trupulleika, sum vit hava av hesum strekkið og vilja teir tí nú, sjálvandi, soleiðis sum teir lovaðu til seinasta val, at her skal gerast liðugt ongantíð ov skjótt. Helst skal tað verða liðugt áðrenn tað er byrjað søgdu summir!

Her er nakað av vegi gjørt, treyðugt so og eg fari nokk ikki nógv skeivur, um eg haldi, at teir allir taka sær æruna av hesum.

Vit her á vestara armi, eru veljarar, sum hava tryggja fleiri av teimum sum sita á tingi fyri Eysturoynna tingsessin við okkara stemmum og tí vildi tað ikki verið ov nógv kravt av hesum monnum, at teir vístu á sína ónøgd alment í bløðunum og har ein kann gera seg galdandi fyri hesari søk.

Ein er tó sum hevur skriva um hettar í síðstuni og tað er Torbjørn Jacobsen.

Eg vóni ikki, at TJ skrivar um hetta sum eitt spæl fyri gallarínum, tí TJ hevur góðan møguleikan til at gera sína ávirkan galdandi. TJ er 17 maður í samgonguni og vanligt er at siga, at ein í tílíkari støðu kann gera seg galdandi. TJ veit eisini sum vit onnur, at sagt varð tá ið Skálafjarðar siglingin varð niðurløgd, at hesir pengarnir skuldu brúkast til vegin. Vegurin er ein íløga og ikki sum siglingin, ein rakstur sum skal gjaldast á hvørjum árið.

Eg kann endurgeva eitt av argumentunum ið var brúkt av samgonguni fyri nettupp at niðurleggja siglingina og brúka peningin til annað endamál

*" Bjarni Djurholm metir ikki at núverandi sigling er ein varandi loysn, og tí er tað spill at brúka 6 mio kr. uppá eina rutu ið ikki kann rekast á ein tíðarhóskandi máta. Ístaðin ætlar hann at flyta tær 6 milliónirnar, ið rutan kostar, frá rakstri til íløgu, og í staðin brúka peningin til at betra um vegin millum Skála og Strendur ."* Hetta sigur ikki so lítið !

Tá tað nú er samgongan sum situr við tí longra stránum, má eisini heitast á hinar samgonguflokkarnar sum lovaðu so nógv og tí vunnu valið, um at gera seg galdandi!

Hvar er til dømis.

Sjálvstýrisflokkurin? Kári er væl eisini greiður yvir, at hann kann roknast sum 17 maðurin.

Miðflokkurin? Hann hugsar helst ikki um okkum meira, síðan hann bert hevur tingmannin í Suðurstreymi.

Fólkaflokkurin? Teir hava okkum kanska í tonkunum ? Tó havi vit einki sæð til tað.

**Nú skulu hesi valevnir ikki føla seg so ógvuliga illa, tí ein og hvør veit, at er valið ímillum ein veg í bygdini hjá tingmanninum og okkara veg, eru vit ikki so góðtrúgvin at halda, at okkara vegur verður tikin fram um tann lokala bygdavegin!**

Gott hevði tí verið, um hesi valevnini greiddi okkum frá um teir ætlað at gera nakað við hetta ella ikki, soleiðis, at vit ikki kenna okkum heilt gloymd og bara fáa gylt lyftir tá val er í hondum.

Eitt vita vit øll, at í 2006 tá val verður aftur, verður helst enn einaferð kappbjóða um hendan veg.

Tá tinglimirnir ikki gera so nógv við hetta mál, skal mín áheitan eisini verða á Vinnumálaráðið um, at hóast tað, at tómligt er í kassanum, gloym ikki hendan veg, ***tí hann er alneyðugur fyri menningina og trygdina á hesum økinum.***